# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*»Eg ynski ikki at klandrast við PM í blaðskriving. So ynskir Poul Michelsen at klandrast, má hann klandrast einsamallur. Tað klárar hann nokk.«*
*Jørgen Niclasen, partamaður hjá Poul Michelsen*

## Mentanargripir fólkaogn

Tey, sum eru eitt sindur tilkomin, og sum høvdu nakað við peningastovnarnar at gera, minnast, at tær gomlu bankaleiðslurnar kappaðust um at stuðla førosykum myndlistafólkum. Menn sum Nonnegaard í Føroya Banka og Rasmus Olsen í Sjóvinnubankanum høvdu stóran áhuga fyri føroyskari myndlist og lótu tí bankarnar keypa myndlist. Takkað verið slíkum framkygdum monnum og takkað verið øllum teimum, sum stuðlaðu teimum, vórðu málingar í hundraðtali bjargaðir frá at fara av landinum. Takkað verið slíkum hugsjónarmonnum høvdu okkara mætastu myndlistafólk ein góðan marknað í eini tíð, har tað ikki var vanligt at keypa myndlist.

Við bankabjargingunum gjørdust báðir bankar almennar ognir og vórðu lagdir saman í ein almennan banka, Føroya Banka. Hesin stovnur skal nú einskiljast og tað er tú upplagt at støða verður tikin til tær umleið túsund myndirnar, sum hanga í bankanum ella liggja trygt í bankans boksum. Hesar myndir eru føroyskir mentanargripir. Hesir gripir kunnu ikki javnmetast við annað innbúgv í bankanum, sum sjálsvagt verður selt við. Føroya fólk eigur bankan og Føroya fólk eigur mentanargripirnar. Tað er skylda hins almenna at tryggja, at hesin dýrgripur ikki verður seldur privatum saman við bankanum.

Verða listaverkini seld saman við bankanum, bendir alt á, at verkini fara av landinum. Nýggir eigarar fara ikki at hava somu kenslur fyri verkunum, sum verandi eigari, Føroya fólk. Tað er tí ikki óhugsandi, at ein nýggjur eigari skjótast vil umseta listaverkini til reiðan pening og so verða tey seld. Keypararnir vilja í flestu førum vera at finna uttanlands, serstakliga í Danmark, har áhugin fyri at savna list eftir okkara klassikarar er sera stórur. Her eigur tí nakað at verða gjørt. Her eiga allir flokkar og allar góðar kreftir at standa saman til tess at tryggja eina sømiliga loysn, soleiðis, at hesin mentanargripur verða verandi fólksins ogn.

**Sosialurin**

## Útlendskir konslar eiga ikki at reka føroyskan uttanríkispolitikk

**EDMUND JOENSEN**



Føroyar munnu vera tað einasta landið í heiminum, sum letur um seg ganga, at konslar úr øðrum londum, av sínum eintingum leggja politiskt trýst á landsins stjórnarleiðara, løgmann, og parlamentið, løgtingið.

Áðrenn løgmaður gjørdi viðmerkingar til miðlarnar ella onnur um tey úttalilsir sum íslendski konsulin, Poul Mohr, og finski konsulin, Poul Michelsen, komu við, átti hann at sett seg í samband við finsku stjórnina og somuleiðis íslendsku stjórnina. Tí eftirsum at vit eru von við, at konslar og diplomatar av ymsum slag, við størsta varsemi og stórum neyvleika, úttala seg vegna landið teir umboða, so má kannast, um tað er teirra lands nýggi uttanríkispolitikkur, sum her verður borin fram.

Føroyar hava í hesum valskeiðinum undirskriva sáttmála, og samtykt lóg um uttanríkis viðurskifti og hesi eru síðani fráboðað ST.

Løgmaður er settur at syrgja fyri, at uttanríkispolitikkur Føroyar verður førdur sambært teimum avtalum, sum eru gjørdar við onnur lond, og sum eru samtyktar í løgtinginum.

Skuldi tað hent, sum er óhugsandi í øðrum londum á uttanríkispolitiska økinum, at konslarnir hjá ávikavist Íslandi og Finnlandi í Føroyum hava handlað í ósamsvari við teirra lands almenna uttanríkispolitikk, so er hetta ein sera álvarslig søk fyri teir. (Annar teirra mælti enntá til nýval).

Løgmaður eigur at gera greitt, at tað er hann sum er settur at føra uttanríkispolitikk fyri Føroyar, sambært gjørdum avtalum og tingsins vilja, og at tað er tað hann ætlar at gera.

Alt annað vil av útheiminum verða tulkað sum tendensir, sum man bara sær í bananstatunum.

Avtalur eru nú einaferð gjørdar fyri at halda og ikki at bróta.

## Orrustan um orðini

**ØSSUR WINTHEREIG**
Tíðindaleiðari
Sjónvarpið
Kringvarp Føroya



Rolf Guttensen hevur drigið hvassa pennin úr blekkslíðranum. Tíðindasendingin hjá sjónvarpinum Dagur & Vika fekk nøkur av høggunum. Í einum fólkaræði verður lopið á við orðum – í summum førum sett saman í eini raðfylgju, sum kunnu føra til misskiljingar. Í øðrum førum sett saman, so orðaskiftið tekur dik á seg. Vanliga er orðaskiftið vígvøllurin, har pennurin og orðið leika í.

Dómari er eingin annar enn fólkið - í einum fólkaræði.

Hesin fólkaræðis-vígvøllur skal røkjast.

Rolf Guttesen viðgongur aftarlaga í síni grein, at hann ikki skilur rolluna hjá sjónvarpinum. Og so spyr hann samstundis, um man skal skilja uppgávuna allíkavæl.

Tí seti eg hesi orð saman. Og tey fella í hesi raðfylgju:

Sjónvarpið hevur eins og aðrir miðlar ein leiklut í fólkaræðinum. Ein týðandi partur er at viðlíkahalda, bjóða av, ganga undan og endurnýggja tann vígvøllin, har orðini vera sett upp móti hvørjum øðrum.

Relevantir persónar, viðkomandi spurningar, viðkomandi sjónarmið, sum kunnu kunnu upplýsa, eggja til orðaskifti, bjóða av, øsa og undirhalda. Alt hetta skal sjálvandi byggja á eitt trúverdugt grundarlag.

Og nógv afturat.

Men eftir stendur, at sjónvarpið við at hava eina samrøðu við Poul Mohr, uppfylti fleiri av teimum treytum, sum vit seta til okkum sjálvi.

Vit valdu ein relevantan persón – nevndliga íslendska konsulin í meiri enn 20 ár. Hansara sjónarmið um, hvussu hann helt íslendingar sóu íkomnu støðuna, hann var óræddur í sínum atfinningum at politiska valdinum, hann hevði orðið í síni makt og var undirhaldandi. Og tað týdningarmesta.

Hetta eggjaði til eitt týðandi og viðkomandi kjak. Tað var endamálið í hesum føri.

Í øðrum føri kann endamálið og ætlanin vera okkurt annað.

Men í hesum førinum rukku vit málinum.

ES. At løgmaður – eins Poul Michelsen - nú hevur tikið málið um flagg og sendistovu uppaftur, stendst kanska ikki fyrst og fremst av samrøðuni við Poul Mohr – lat tað vera ósagt. Men tað vísir so, at orðaskiftið var ikki heilt liðugt og heldur ikki heilt óviðkomandi.

## Sannleikin illa lýddur

**JØRGEN NICLASEN**



Lat meg gera greitt, at mín frágreiðing um nevndarkrav frá Poul Michelsen er fult í trá við sannleikan. Er váttað av Anfinn Kallsberg. Eg ynski ikki at klandrast við PM í blaðskriving. So ynskir Poul Michelsen at klandrast, má hann klandrast einsamallur. Tað klárar hann nokk.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Bjarta Joensen bjarta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Eyðhild Jacobsen eydhild@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.